


# Mong eru bløðini,
# men BLAÐIÐ er eittans ...

**Ja** eg tekni meg sum haldara av Sosialinum fyri 400 krónur ársfjórðingin

Samstundis eri eg við í luta-kastinum um eina ferð frá

ATLANTIC AIRWAYS

Navn

Bústaður

Býur/bygd

Tel

e-mail

Sosialurin






*Regin Waagstein frá Geus og Claus Andersen frá Jarðfrøðissavninum saman við Eyðun Elttør, landsstýrismanni og tveimum finskum borimonnum*

*Mynd Álvur Haraldsen*

# Boring á Glyvursnesi lykil til framtíðar leiting

**Ein stórur partur av føroyska landgrunninum, sum í framtíðini fer at verða leitiøkið hjá oljufeløgunum, er fjaldur av basalti. Enn er torført við seismiskum kanningum at "síggja" niður undir basaltið - um og hvar møguliga oljukeldur eru. Fyri at betra um kanningarhátt og mátingar er neyðugt at skilja basaltið betri. Tað er m.a. hetta boring á Glyvursnesi og seismiskar kanningar á Nólsoyarfirði skulu hjálpa við**

OLJUBORING Á GLYVURSNESI

*Jan Müller*

Í síðstu viku byrjaði ein 600-700 m djúp granskingarboring á Glyvursnesi. Boringin er ein liður í einum størri Sindri verkætlan har Danmarks og Grønlands Geologiske Undersøgelse (GEUS) er fyristøðufelag fyri sjálvum boriarbeiðinum og logginini. Føroya Jarðfrøðisavn (JFS) luttekur í arbeiðinum sum undirveitari og skal geva sítt íkast við m.a. kjarnulýsingum.

Tá Sosialurin vitjaði á boristaðnum mánadagin var landsstýrismaðurin í oljumálum, Eyðun Elttør eisini har. Tá høvdu teir borað umleið 140 metrar niður og høvdu tikið hópin av kjarnuroyndum, sum síðani verða analyseraðar av eitt nú serfrøðingum á Jarðfrøðissavninum. Hóast talan er um eina vísindaliga boring, har tað ikki verður leitað eftir olju ella gassi, so heldur Eyðun Elttør, at nettupp henda kanningin er av stórum týdningi fyri framtíðar leitingina við Føroyar. Júst tí at stórur partur av føroyska landgrunninum er fjaldur av einum tjúkkum lagi av basalti er tað týdningarmikið fyri víðari leitingina at kunna skilja basaltið betri fyri harvið við seismiskum bylgjum betri at kunna "síggja" niður undir basaltfláirnar, har tað vónandi finnast stórar olju- og gasskeldur. Nettupp tí at fleiri ella flestu av økjunum við Føroyar, sum verða framtíðar leitiøki, eru fjald av basalti, er tað so umráðandi longu nú at fáa meiri vitan um basaltið.

Landsstýrismaðurin fegnast um tað samstarvið, sum er komið í lag við Sindri og vónar hann, at hetta kann koma at hjálpa okkum at koma nærri svarinum, um tað finnast olju- og gasskeldur á føroyska landgrunninum. Oljumálaráðið fylgir í hvussu er kanningunum við stórum áhuga. -Nú vit eina ferð í framtíðini skulu til at taka støðu til eina møguliga nýggja útbjóðing og tá oljufeløgini, sum hava 9 ára loyvi skulu taka støðu til møguligar boringar, so eru hesar kanningarnar á Glyvursnesi av alstórum týdningi sigur landsstýrismaðurin

Tað eru tveir persónar, sum hava sera gott innlit í føroyska jarðfrøði og til jarðfrøði sum heild, sum standa fyri kanningini. Nú tað er Geus, sum er fyristøðufelag er tað eisini eitt av teirra fólkum, Regin Waagstein, sum er projektleiðari. Harumframt er Claus Andersen frá Jarðfrøðissavninum eisini við í arbeiðinum umframt onnur á savninum.



*Regin Waagstein, sum er ein av okkara royndu jarðfrøðingum vísir okkum ein av boriprøvunum, sum er komin upp úr dýpinum. Við liðini á honum Claus Andersen frá jarðfrøðissavninum*

*Mynd Álvur Haraldsen*

Talan er um eina rættiliga stóra verkætlan, sum umframt hesa boringina á Glyvursnesi eisini fevnir um seismiskar kanningar á Nólsoyarfirði. Mett verður, at Glyvursnes og Nólsoyarfjørður eru ideell tvs. sampakka væl saman til eina boring á landi og so seismiskar kanningar í havinum. Her fær tú nakað, sum líkist eini paralellari synergieffekt.

Sosialurin skilur, at samlaða upphæddin fyri verkætlanina, sum fer at vara í hálvt fjórða ár, er einar 10 mill.kr.

Tað er tað finska borifelagið Suomen Malmi OY, sum stendur fyri boringini.

*Framhald á síðu 14*